
B R Ø V



(Framhald)

Fyri mær kann tað ikki vera annað enn, at okkara vrakilóg gevur saltfiski okkara landaður í Føroyum alt ov lítlan rætt til at gerast 1. floks, ella verður vrakilógin nýtt við kæruloysi av vrakarunum, ella í triðja lagi, at við at skera góðskuna niður ger tað lættari fyri Fiskasøluna at selja saltfiskin fyri lágan prís til teir somu saltfiskakeyparar, sum geva nógv betri prís til teir somu saltfiskakeyparar, ið geva nógv betri prís til teir í øðrum londum, ið vraka sama saltfisk í nógv størri virði og kunnu so harvið geva nógv betri prís til fiskimannin.

Tí appelleri eg til okkara fakfelag, at tað er av tí ov lítið vunnið, hóast tað við stríð og strev bara vinnur hægri og hægri procentir til fiskimannin, tá ið tað framvegis verður ov lítið at býta procentið við.

Eg vil eisini loyva mær at vísa á, at við at vraka saltfisk longu inn frá skipslastini kemur fiskimaðurin at verða dømdur órættvíst. Fiskimaðurin má kunna verja rætt sín til góðskuna av fiskinum, ið hann hevur framleitt, og tað er góskuni hann hevur lagt skipið til kei við, og má hann landast við eftirliti frá fiskimanninum, tí við at lessa av slenginum í bilar og føra hann í eitthvørt fiskihús — og lessast undir koyringini og síðan vippast av bilinum í rúgvur, tá er góðskan longu broytt so nógv til tað verra og kann tá ikki fáa annað enn eina órættvísa vraking, tí allir vita, hvat saltfiskur er bygdur av. At eg eri langt av leið við ábreiðslum mínum haldi eg ikki, tí tað gevur sjón fyri søgn tað ið skrivað er um, tí haldi eg, at tað er stjórnsins ábyrgd at kanna hetta mál gjølla, og ikki minst er tað Fiskimannafelagið, ið verja skal fiskimansins rætt, men higartil einki hevur gjørt í hesum alttýðandi máli. Fiskimaðurin tigur undir mannminking og misbýti, rýmur í onnur lond og byggir har við sínum egnu vápnum ein skansa upp, ið stríðast skal seinri móti honum sjálvum.

Í nýggjársrøðuni nam løgmaður við, hvussu umráðandi tað var, at vit framdu góðskuna av fiskinum og haldi eg, hann eisini meinti við sildina, tí hon er eisini fiskur, og er tað ikki so lítið týðandi táttur í okkara tjóðarframleiðslu. Men tíanverri er har ikki besta skilið.

Sum øll vita, er Sildasølan eitt misfostur av Fiskasøluni, sum yvirfyri fiskimanninum og samfelagnum skapar sálarlig afturstig við síni ómansligi røking av tí stóra áliti, ið stjórnin hevur litið henni upp í hendur. Eg veit væl, at ein slík ábreiðsla er ógvuliga køld og ikki so lítið brutal, men eg haldi, at eg, sum nú havi verið í fiskivinnuni í 53 ár, skuldi vitað, hvat ein rættvís løn fyri góða gerð er fyri nakað, og tá ein ikki kann fáa hana, í Føroyum, men í øllum øðrum londum, hvussu gamal ein so er vorðin, so má ein nú ella ongantíð tala.

Og vil eg hervið forvitnast um, hvat vald stjórnin í Fiska- og Sildasøluni hevur, tí vit hava íkki betur vitað, enn monopolvaldið er burturtikið í demokratiskt stýrdum londum, og at einki ríki gevur út valdið til nakrar spekulantar at spekulera og hundsa við landsins ágóðum, ið vinnast, sum til dømis við landsins fiskimonnum, sum tað tíanverri er gjørt her.

Dømi I. Og vil eg føla meg fyri um tvey skip, ið fara á marknað í senn og selja ymiskt, annað fyri 5000 £ og hitt fyri 2000 £. Hevur so tað skipið, ið seldi fyri 5000 £ skyldu at býta út javnt við tað skipið, ið seldi fyri 2000 £, altso 3500 £ til hvønn?

Dømi II. Um tvey skip koma heim úr Grønlandi, annað við 200 tonsum av fyrsta floks fiski og hitt eisini við 200 tonsum, men við rotnum fiski, skal so skip og manning á tí góða skipinum býta javnt við skip og manning, ið førdi køsta rúgvuna til lands?

Um ikki, so er tað heldur ikki rætt, Sildasølan í 1967 dømdi sildafiskimenn við tí góðu sildini til, at býta peningin fyri sína hart vunnu góðu sild javnt við teir menn, ið høvdu sýnt kæruloysi og framleiddu ónýtiliga sild.

Munur er á, hvat ið gjørt verður við teir í øðrum stættum, ið sýna framúrskarandi vinnu, ja, hvat annað enn eitt heiðurstekin.

Mannminkan!

Men við tí føroyska fiskimanninum er tað alt nakað annað. Hann skal vanvirðast, ja mannminkast í staðin fyri at metast høgt, um hann ger nakað gott. Ja, er tað ikki løgið og ógvuliga mótstríðandi, tá ið sagt verður um okkara fiskimenn, hvussu nógv hann er verdur fyri samfelagið, tá ið stjórn okkara loyvir, at teir fiskimenn, ið gera best arbeiði í vinnuni, skulu straffast fyri tað við at minka teirra tænastu í staðin fyri at vaksa um hana, og er tað tá løgið um okkara samvitskukenslur falla við at vinna góða fiskaframleiðslu, tá ein fær ikki meira fyri góða varu enn fyri ringa.

Ja, einki land misrøkir so tarviliga illa sína ómetaliga dýru ogn, ið tað eigur í fiskinum, sum Føroyar, og einki fakfelag verjir so illa sítt starv sum Fiskimannafelagið verjir okkum fiskimenn. Eg síggi her fyri mær tvær váttanir, ein frá Fiskimannafelagnum og ein frá Skipara- og navigatørfelagnum, ið verja skulu fyri mannminkan og misbýti, og hvat gera teir?

Viðvíkjandi sildini, ið varð veidd í 1966, so gingu 17 mánaðir at fáa avrokning, og mátti tí ein, ið fekk fyribils uppgerð og hevði goldið skatt av henni, lata út aftur fjórðingin, ið svara til helmingin av tí vinningi, hann skuldi átt fyri sína væl framleiddu varu, og varð hann ikki bara sakleysa dømdur av Sildasøluni, men eisini av vrakaravaldinum, sum við ringum eftirliti hevði sent skemdarvarur út av landinum, men sum endaðu aftur í Føroyum — í køstinum! Teir, sum fiskað høvdu hesa sild, ið ikki stóð mál, fingu løn úr lønjavningar grunninum. Men eg føli eisini við teimum útgerðarmonnum, sum vóru sakleysir í hesum, men átti heldur landið at goldið teimum eitt sovorðið tap, heldur enn at dømt sakleysar fiskimenn at gjalda tað.

Ja, er hetta annað enn sama svik, ið gjørt varð móti sildamonnunum á sinni, tá ið manglaði í ta mongd, ið seld var til Svøríkis, og tá okkara háttvirda stýri lokkaði skipini útaftur á vetrartíð at fiska, fyri at fáa allan prísin, ið Svøríki gav meira enn vanliga í staðin fyri puljuprís. Væl eydnaðist at fiska tað, sum í vantaði, men ikki vórðu lyftini hildin, kastað varð saman í pulju. Harvið fingu teir, ið heima eftiri vórðu, ágóðan, ið vit fiskaðu út á tað, ið teir høvdu fiskað fyrr um summarið. — Er hetta lyfti ikki bara ein dreymur, mín, so kanska stendur tað skrivað í løgtingsins gerðabók? Og stendur tað skirvað har, so er tað bara ein vanvirðing meir til fiskimannin.

Ikki eru tað fáir kennarar, ið sita á í okkara politisku sessum, og hevði tað verið áhugavert at vitað, um teir eisini í skúlanum ignorera teir næmingar, ið sýna góðan dugnaskap, og býta karakterin javnt við teir, sum einki duga.

(Framhald)

Sofus í Hvilvt, Fámjin.

* * *

NØKUR ORÐ UM ORÐASKIFTIÐ Á TINGI UM FÍGGJARLÓGINA

Tað er ikki nógv at siga um orðaskiftið á tingi um fíggjarlógina burtursæð frá nøkrum løgtingsmonnum.

K. Mohr var ikki mildur, tá ið hann kom upp á røðarapallin, hann byrjaði við at siga, at hann talaði til Føroya fólk, og so tosaði hann um dómin, ið var dømdur og so P. M. Dam og javnaðarflokkin. K. Mohr var ikki mildur, og so vildi hann hava val, so teir kundu seta javnaðarflokkin upp í ein krók, sum teir gjørdi tað við javnaðarflokkin í Danmark.

Kjartan Mohr sær einki gott í javnaðarflokkinum í Danmark ella í Føroyum, hvat skal man siga um ein mann, sum einki gott sær í sosialismu.

Men tað er bara gott, tí annars kundi man tikið feil, men nú er tað so klárt at ongin fer skeivur av Kjartan Mohr.

Ein tjóðveldismaður sum hevði orðið, vildi vera við, at danir høvdu skuld í øllum tí ónda, ið hent var í Føroyum, eisini at hann var búsitandi í Havn. Tað vóru danir ið høvdu skuldina í tí.

Annars sigi eg tað sama sum Danbjørg segði við Øregaard; Danbjørg bað Øregaard ikki taka tað so tungt, um mótstøðumenn fóru harðliga í móti honum, verri hevði verið um teir rósaðu honum.

Eg havi altíð verið av tí meining, at tá ið mótstøðumenn goysa gor og gall eftir javnaðarmonnum og helst eftir P. M. Dam, tá veit eg, at tað stendur væl til, tí um nú Dagblaðið og 14.indi og teirra líkar fóru at lyft javnaðarmenn og serliga P. M. Dam upp til skýggja, tá hevði eg ivast í stórum, um ikki nakað var galið.

Og so er tað at hava virðing fyri eldri fólki. Kj. Mohr segði til landsstýrið, at teir vóru 200 ár, men um aldurin á Kj. Mohr varð faldaður við 3, so mundi aldurin togað upp í móti 200 árum. Tá ið eg var ungur, vórðu vit lærd at virða og respektera eldri fólk.

S. P. J.

* * *

NATIONALISERING

Mangan hevur prísforðan rakt útróðrarmannin meint í bestu veiðutíð. Og av nevndu keðiligu orsøk hava menn í ymsum bygdum tí tikið seg saman og saltað fiskin sjálvir, men at hetta mangan kann vera kostnaðarmikið og trupult fyri nakrar fáar menn, er vituligt; betur hevði tí verið um hetta varð framt í einum størri felagsskapi sum t.d. á andeilsgrundarlag.

Fyri nøkrum árum síðan uppstóð eitt tílíkt prísstríð millum útróðrarmenn og fiskakeyparar, at einasta loysnin var hildin at vera at fáa løgtingið at seta eina prísásetingarnevnd, sum hevur virkað í umleið fýra ár til hon nú sprongdist uppá prísósemju. Fyri ikki at vísa seg heilt negativar, hava fiskakeyparar heitt á landsstýrið um at seta eina appell-nevnd, hóast tað væl kann hugsast at ein tílík nevnd verður líka lítið respekterað sum tann við **løgtingslóg setta ráfiskaprísnevnd**.

Landsstýrið eigur at vera varið við at renna ov nógv á leistum fyri slíkar harrar samstundis sum útróðrarmaðuin ikki eigur at vísa seg teimum »undirbrottligur« við teirra fiskakeypi, men ístaðin við stuðuli frá løgtingi og landsstýri fáa hjálp at seta føtur undir egið keyps- og sølufelag, og soleiðis sjálvir fáa tann vinning, sum aðrir renna avstað við fyri lítið og lætt gjørt arbeiði.

Tak bara Sildavirkið í Fuglafirði hvussu stórur peningur fellur í nakrar fáar lummar samstundis sum teir bátar, ið veiðuna hava drigið til virkið eru við at fara á húsagang — og har aftrat manningin lítið og einki fyri sítt knoss. Hetta virkið hevur tó lagt raksturin fram í ljósið, meðan eitt annað nógv størri felag sum Føroya Fiskasøla, ið umsitur landsins fiskaútfluttning hevur sín stóra roknskap undir »lukt og lási«.

At her krevur vend er skilligt og er kjansur til at venda, so útróðramansins eins og fiskimansins stríð kemur teimum sjálvum til góðar ístaðin fyri nøkrum spekulantum.

Ístaðin fyri at stríðast um søluprís, og ofta undir longum stríði missa nógv av lítlari inntøku, kann sleppast utdan hesum við at lata eyguni upp og ásanna at møguleiki er til at frígera seg frá at noyðast at liva og stríðast bert sum eitt amboð fyri einstakar harramenn, sum vilja hava fjøldina at trúgva at uttan teir er eingin møguleiki til lívsuppihald — hesum somu eina til peningaligan vinning sum afturfyri ikki geva samfelagnum sín rættvísa part.

Javnaðarflokkurin hevur altíð hildið tað vera rættvíst og eina sjálvfylgju, at arbeiðarin og fiskimaðurin eigur síni virkisamboð á sjógvi og landi, og soleiðis fáa allan ágóðan.

Nationalisering er eitt gamalt mál hjá javnaðarflokkinum, sum tíverri hevur ligið alt ov leingi á láni, og sum politiska rákið enn er, er lítil vón um at fremja eitt so týdningarmikið mál. Tíverri skal sigast.

d.

* * *

EFTIR FUMMUM!

Leiðarin í Dimmalætting nr. 34 21.3 1968 er so villeiðandi og illa undirbygdur, at vit stutt skulu loyva okkum at koma við hesum hesum viðmerkingum.

Leiðarin er uttan roynd til bevís, frá enda til annan bygdur uppá »iva« við so grovum úttrykki sum **fullsett.** Lætt hevði verði fyri Dimmalætting at sikra sær sannleikan og prógv frá okkum, men er hettar við ella uttan vilja ikki gjørt. Er hettar ikki grov undirvurdering av blaðsins lesarum.

Tað skal standa fast, at tað er bæði satt og beint, sum Flogsamband frá fyrstan tíð av og til henda dag hevur borið fram.

Tað tykist ófatuligt, at Dimmalætting heldur, at oyra ikki nýtist at leggja til sakkunnleikan. Hettar halda vit er at fara fram »eftir fummum«.

Vit hava ikki verið av slíkari hugsan, men søkt danskan ekspert innanfyri hesa grein, sum síðan er løgd fyri SAS stjóran — Johs. Nielsen. Sami stjóri segði, eftir at SAS ekspertar høvdu kannað upplegg og kalkulatiónir í hesum sambandi, at teir ikki kundu seta fingur á tær. Eisini varð sagt, at **vit ongantíð** komu so bíliga til eina loysn, sum av fyrstan tíð var sett fram av Flogsamband. Tað eru frá føroyskari síðu, sum standa Dimmalætting nær, gjørdir fyrispurningar um at koma uppí part við SAS við tí svari, at tað var økonomiskt uttan fyri allan møguleika.

Vit hava eisini samráðst við SAS um flogsamband við Føroyar og er tað, sum nú er borið fram til landsstýrið, tann vegur sum SAS vinarliga hevur ávíst okkum. Sjálvir kunnu teir ikki við egnum tilfari átaka sær hesa rutu.

Tá »spået« verður í sama leiðara »om fremtiden« — um veðurlagið — so er nú nógv daglig erfaring, ið ein má halda seg til. Veðurlagið verður neyvan annarleiðis fyri føroyskt felag enn fyri **útlendskt.**

Gleðiligt var, at SAS-stjórin undir vitjan síni 8. januar í ár segði, at rutan bar seg og líka gleðiligt, at Dimmalætting sigur flogsamband er av størsta týdningi fyri Føroyar.

Er tað tí nakað at ivast í, tá bæði rentabilitetur og týðandi tørvur er til steðar, enn at fara undir hettar tiltak — fyrr jú betur.

Pf. FLOGSAMBAND

NORÐOYA JAVNAÐARFELAG

heldur fund á Klaksvíkar Sjómansheimi í kvøld kl. 20.

Aktuellir spurningar verða viðgjørdir.
Løgtingsmenninir Reinhold Sílá og Poul Jacob Olsen luttaka.

Øll eru vælkomin.

Nevndin.

Frágreiðing ...

(Framhald frá 1. síðu)

prís. Tað var sjálvsagt nevndin, sum gjørdi hetta.

Tá ið ráfiskakeyparafelagið síðan boðaði frá, at tað hevði tikið tað álvarsama stig at taka limir sínar úr ráfiskanevndini, so mugu vit geva teimum rætt í, at hetta er eitt **álvarsamt** stig, ja eitt lógbrot.

Við lóg varð prísnevndin sett. Keyparafelagið góðkendi og undirskrivaði reglugerðina, sum prísnevndin arbeiðir eftir, og valdi sínar menn í nevndina. Hvør føroyingur má vita, at keyparafelagið er bundið av avgerð nevndarinnar, og at keyparafelagið fremur lógbrot við at sabotera avgerðina hjá hesi almennu nevnd, sum er sett eftir løgtingslóg, og við at blokera útróðurin í Føroyum.

Víst er tað áivarsamt, at eitt felag setur seg upp um lógina og landsins myndugleikar. Vit hava lagt til merkis, at nevndarlimirnir, Jens Pauli av Reyni og Tórstein Vilhelm, ikki hava sagt nakað alment í hesum máli.

Spurningurin er, um teir vilja lata taka seg úr nevndini, ja, um teir hava rætt til tess, uttan at ráfiskakeypararnir hava tilnevnt tveir aðrar.

Ið hvussu er, eru ráfiskaprísirnir bindandi ásettir og tað av ráfiskaprísásetingarnevndini.

Harnæst loyvdi ráfiskakeyparafelagið sær at lýsa aðrar og lægri prísir enn teir, sum prísásetingarnevndin hevur ásett.

Í løgtingslógini nr. 16 frá 9. apríl 1964 stendur klárt og greitt: »Ásetti prísurin er at fata sum ein minstiprísur«. Vit í nevndini hava ikki aðrar viðmerkingar enn, at hetta má vera lógbrot. Men sum umboðandi útróðrarmenninar kunnu vit ikki annað enn mæla øllum útróðramonnum frá at avreiða fyri henda ólógliga prís, tí harvið vilja vit ikki bert skaða okkara áhugamál, men eisini gera okkum meðsekar í lógloysinum.

Eisini var ráfiskakeyparafelagið so ósmæðið at siga, at teir høvdu vent sær til Føroya landsstýri við áheitan um, at lóggávan um prísáseting verður broytt. Tað man vera einsdømi, at lógbrótarin á henda hátt ætlar at klára frísak við at fáa lógina, hann breyt, avtikna.

Nú ið fiskakeypararnir eru farnir út til almenningin við hesum máli frá prísásetingarnevndini, ætla vit báðir nevndarlimir at gera tað sama, men vit fara ikki sum ráfiskakeyparafelagið at tveita út pástandir. Í fyrstkomandi bløðum ætla vit at kunngera grundarlagið, sum tann ásetti prísurin byggir á.

Vit eru sinnaðir til, at greiða Føroya fólki frá teimum tølum og prísum, sum ráfiskaprísnevndin tann 4.3.-68 bygdi sínar nýggju prísir á, men av tí, at vit hava undir tøgnskyldu fingið sumt av hesum tilfari at vita, so fara vit fyribils at hava hetta hjá okkum sjálvum. Leikur er ikki lokin, men fer tað at vísa seg, at lógloysi ræður í hesum landi, so fara vit at koma alment fram við bæði einum og øðrum, sum onkur ikki vil síggja uppá prent.

Dan. J. Jensen - Frits Olsen,

limir í teirri eftir løgtingslóg nr. 16 frá 9.4. 1964 um ráfiskaprísir settu ráfiskaprísnevnd.